# KYNSTRIÐ AT GERAST EIN **RÆTTUR FØROYINGUR**

FØROYSKA SAMFELAGIÐ MÁ GERAST RÚMLIGARI, UM FØROYAR SKULU HAVA NAKRAN MØGULEIKA AT KAPPAST VIÐ ONNUR SAMFELØG. TAÐ METIR **OLE WICH**, LISTAMAÐUR, SUM SKRIVAR EINA NÝGGJA BÓK UM TRONGSKYGDAN TJÓÐSKAP OG UM AT GERA UPP VIÐ HUGSJÓNIR, SUM ERU ÚTIHÝSANDI HELDUR ENN INNBJÓÐANDI



**SAMRØÐA**
**Heini í Skorini**
heini_skorini@yahoo.com

– Hví spyrt tú ikki Jóanes Nielsen um tað sama?

Svarið kemur prompte, tá eg spyrji hann á eini larmandi kafé í miðbýnum í Havn, hví ólukkan hann hevur valt at búgva í Føroyum, um hesar oyggjarnar eru so forferdiliga konservativar, nationalistiskar og fundamentalistiskar, sum hann vil vera við.

Boðskapurin í hansara aftursvari er púra greiður. Jóanes Nielsen fær ikki ein slíkan spurning, tí hann er føroyingur. Men Ole Wich fær hendan spurningin, tí hann er dani.

Tað er við øðrum orðum ein kvalitativur munur á Ole Wich og Jóanes Nielsen. Munurin er, at Ole Wich ikki hoyrir til tað føroysku ættargreinina.

### Útihýsandi tjóðskapur

Umstríddi danski listamaðurin við tí hálvsíða hárinum er troyttur av at skula verja sín rætt til samfelagsrevsandi list, bert tí hann er dani. Hann metir, at flestir føroyingar stara seg blindar uppá, at maðurin er danskari. Tá hann kritiserar føroyska samfelagið fyri intoleransu, trongskygni og annað gott, so verður spurningurin straks reistur, hví hann ikki bara pillar av. Og hvat hann í roynd og veru billar sær inn at fortelja okkum føroyingum, hvussu vit skulu innrætta okkara samfelag.

Besta dømið var í 2005, tá Bill Justinussen í Miðflokkinum vildi hava fútan at reisa ákæru ímóti hesum útlendinginum fyri víðagitna homoFObia merkið undir orrustuni um § 266b og tey samkyndu.

– Ole Wich gjørdi seg til dómara yvir føroysku tjóðini og misnýtti okkara fremsta tjóðareyðkenni á sera ódámligan hátt. Ole Wich er dani, og júst tí kendi eg álopið sum eitt álop frá tí verðsligu Danmørkini ímóti teimum kristnu Føroyum, sigur Bill Justinussen í dag.

Men homoFObia prosjektið var bert eitt av mongum umstríddum listaverkum ígjøgnum árini, sum hava gjørt mannin illa lýddan í pørtum av Føroyum. Í 1996 útgav Ole Wich yrkingasavnið “Upphav” um tað at vera danskari í Føroyum. Eitt lýriskt verk, sum torpederaði tjóðskaparligar minnilutakenslur, protektionistiska nationalismu og óttan fyri tí, sum kemur uttanífrá.

Fá góvu savninum gætur í Føroyum, men gitni ummælarin Ulrik Høy á donsku Weekendavísini gav savninum imponerandi gott skoðsmál. Yvirskriftin var sjálvandi “Helvitis danskari!”. Og Ole Wich fekk status sum ein whistleblower í Føroyum.

Undir § 266b-stríðnum var tað víðgongdur kristindómur, sum stóð fyri skotum. Nú er persona non grata aftur farin í holt við spurningin um integratión og um samanstoytin millum føroyskan tjóðskap og útlendska ávirkan. Ole Wich skrivar í hesum døgum eina bók um evnið, sum fyribils ber heitið “Kunsten at blive en rigtig færing”.

– Mítt mál er at víðka um tann føroyska veruleikan á øllum økjum. At rúmka um føroyskan tjóðarsamleika, sum er trongskygdur og læstur fastur í gomlum hugmyndum um, hvat tann nationali felagsskapurin skal grundast á, sigur síðhærdi listamaðurin, tá eg nakrar dagar eftir samtaluna í býnum siti í køkinum hjá honum á Grønlandsvegnum í Havn.

Eitt trongligt og óruddiligt heim í einum gulum dupulthúsum, sum neyvan hevði komið ígjøgnum náleireygað á Kvinnu ella Rákinum í Sosialinum, tá nýggjastu møblasniðini skulu vísast fram í snollaðum stovum ella poleraðum køkum.

> Tann ekskluderandi nationalisman er ein avgerandi forðing fyri at modernisera tað føroyska samfelagið

Hansara komandi bók er ein uppgerð við ta sonevndu nationalsjauvinismuna og eitt boð uppá, hvussu integratiónin kann betrast. Við nationalsjauvinismuni sipar Ole Wich til eina útihýsandi tjóðskaparhugsjón, sum byggir á nationalromantiskar identitetskonstruktiónir, og sum stimbrar eina mentanarliga og andaliga avbyrging frá umheiminum.